# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**L-C007-4**


# Leiðbeining um borðfresarar til træsmíð

Borðfresari skal vera væl útgjørdur og nýttur við skili eftir reglunum í arbeiðaraverndarlógini og kunngerð um um teknisk hjálpitól v.m., sum Arbeiðseftirlitið umsitur.

***Brúkaravegleiðing*.**

Fyri allar útveganir (sølu, leigu og lán), er galdandi, at skrivlig vegleiðing skal latast, sum er orðað á føroyskum ella donskum máli, við frágreiðing um nýtslu og viðlíkahald.

***Útbúnaður*.**

Borðfresarar skulu tryggjast soleiðis,

- at fólk ikki kann koma í samband við malandi amboð og ás,
- at arbeiðsevni kann førast trygt fram í øllum fyrikomandi fresiarbeiði,
- at amboð og arbeiðsevni eru virðiliga fest og tryggjað, so einki loysnar og elvir til skaða,
- at amboð vandaleyst kann uppsetast,
- at skaða ikki hendir, um fresarin av óvart verður settur í hægri ferð,
- at skaði ikki stendst av ási og jørnum, ið mala eftir at fresarin er slóktur.

Tá tú nýtir atløgufjøl, skulu ásur og jørn fjalast við verjuhettu aftan fyri atløgufjøl og trýstfóti og framdragara framman fyri atløgufjøl.

Har arbeitt verður við ongari hjálpifjøl, skulu ásur og jørn verða fjald við verju og avskerming av tí partinum av fresaranum, sum ikki verður nýttur.

Er haldarin fýrhyrntur skal jarnopið verða afturlatið.

Spennibakki skal hava tøppar, sum tryggja, at jørnini ikki loysna.

Tað skal altíð vera minst 12 mm eftir av jarninum aftantil (sí strikumynd 1).


***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.

***Útgivið fyrstu ferð:*** **21. mai 1988**

***Seinastu broytingar:*** **23. januar 1996**






**Strikumynd 1** **Strikumynd 2**

Borðfresari við tveimum ella fleiri skjótleikum, skal vera útgjørd við bremsu, sum forðar fyri ótilætlaða ferð, enn tann, sum fresarin er ætlað til.

Strikumynd 2 vísir útbúnað, har neyðugt er at trýsta A tøppin inn, tá skiftast skal frá I til II.

Um skjótlekin skal broytast við reimskifti, eigur tabell at vera á maskinuni, sum upplýsir, hvussu snúningstalið á ásinum skal vera, samanborið við ymsu støðurnar hjá reimini.

Hvør einstakur borðfresari skal hava nullspenningsfráfall, sum forðar fyri at hon fer í gongd, tá streymslit ella ólag er á ljósnetinum. Koblingin skal vera nærindis start útbúnaðinum.

Start- og steðgi útbúnaður skal vera lætt atkomiligur.

Start útbúnaðurin skal tryggja móti ótilætlaðum starti. - Tað kann gerast við:
- at startknøtturin er skjúldur, yvirlokaður ella útgjørdur við kraga,
- at snúningsavbrótarin er útgjørdur við kraga, uttan so at konstruktiónin forðar fyri ótilætlaðum ávirkanum.

Ein bremsa skal vera, um fresarin ikki steðgar í mesta lagi 10 sekundir eftir at maskinan er avbrotin.

***Nýtsla.***

Har tað er gjørligt, skal altíð nýtast trýstfótur, verjuringur ella framdragari. Tann parturin av fresar-anum, sum ikki verður nýttur, skal vera fjalt við verjuhettu el. líkn. so vítt sum til ber.

Hóskandi uppseting, tá atløgufjøl verður nýtt. Strikumynd 3.




**Strikumynd 3**
1. *Lodrættur trýstfótur við fjøður*
2. *Vatnrættur fótur við fjøður*
3. *Verjuhetta aftanfyri atløgufjøl*
4. *Atløgufjøl*

Tá tynnri evni vera fresað, kunnu gerast trýstføtur, sum ávíst á strikumynd 4. Nýt asktræ til føtur.



**Strikumynd 4**

Avbrotin fresing kann tryggast gerast við flytbarari atløgufjøl. Strikumynd 5.



**Strikumynd 5**

Hóskandi uppseting, tá bogin evni skulu gerast. Strikumynd 6.




**Strikumynd 6**
*1. Verjuringur*
*2. Skjól*
*3. Stoytkubbi*

Fresarin eigur at vera slóktur, tá stillað verður til hædd og djúpd.



**Strikumynd 7**

Hóskandi máti- og stilliútgerð er víst, sí strikumynd 8.



**Strikumynd 8**

Tá tú stillar og skiftir jørn, skal ásurin verða festur við bremsuútgerð.

***Viðlíkahald**.*

Borðfresarar skulu haldast væl og eiga altíð at vera í góðum standi. Fylg tí vegleiðing, ið sølumaðurin gevur.

Viðlíkahald og umvælingararbeiði skal gerast tryggiliga. Orkukeldan skal vera tikin frá, t.d. við avbrótaralykli.

***18 ára aldursmark**.*

Ungfólk undir 18 ár eiga ikki at arbeiða við borðfresimaskinu. Serligar reglur eru galdandi fyri næmingar og lærlingar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 21. mai 1988

Eli Davidsen, stjóri (sign.)